# Kyrjasteinur – hin seinasta skonnartin í Føroyum



**SØGA** Í februar í 1937 kom fiskiskipið Kyrjasteinur á Fuglafjørð. Um hetta mundið taldi fiskiflotin í Fuglafirði eini 15 skip, harav tríggjar skonnartir. Í dag – stívliga sjeyti ár seinni – er einki av hesum skipum til longur uttan Kyrjasteinur, sum samstundis er einasta skonnartbygda skip, sum eftir er í Føroyum

Vilmund Jacobsen

Í Fuglafirði – beint út fyri søguliga staðum Karvatoftir og tætt yvir av Mentanarhúsinum - stendur skonnartin Kyrjasteinur uppi á landi. Her hevur skipið staðið seinastu árini, samstundis sum sjálvsognarstovnurin Karvatoftir eigur skipið og hevur til endamáls at gera skonnartina nýtiliga í mentanarsøguligum kunningarstarvi.

Kyrjasteinur er hin seinasta av mongum skonnartum, sum eftir er í Føroyum. Sjálvt Føroya Fornminnissavn metir, at skipið hevur stórt søguligt virði og metir, at skonnartin sum fornlutur umboðar eitt serstakt skipaslag, sum var vanligt í Føroyum í slupptíðini.

Skipið, sum er vorðið ein partur av býarmyndini í Fuglafirði, hevur eisini sína søgu.

Tað var longu í 1936, at keypmaðurin og reiðarin, Jacob Haraldsen í Fuglafirði, gjørdi sáttmála um fiskiskipið á skipasmiðju í Korsør í Danmark.

**» endamálið við verkætlanini er at fáa Kyrjastein at síggja út, sum hann upprunaliga sá út**

Kyrjasteinur, sum er 148 brt stórur, er bygdur úr eik.

Í februari í 1937 kom skipið á Fuglafjørð. Um hetta mundið taldi fiskiflotin í Fuglafirði eini 15 skip, harav tríggjar skonnartir. Í dag – stívliga sjeyti ár seinni – er einki av hesum skipum til longur uttan Kyrjasteinur.

Úr søguni um skipið, kann sigast, at Kyrjasteinur hevur skift eigarar, síðan Haraldsensmenn í 1961 seldu skonnartina av bygdini.

Nøkur ár hevði hon eisini heimstað í Havn.



*Tað fer helst at kosta einar 2-3 miljónir krónur at gera Kyrjastein til eitt sjósavn, ið verður handað sum gáva til Fuglafjarðar kommunu*

## Stovnaðu grunn

Í 1992 skuldu táverandi eigarar í Porkeri lata Kyrjastein søkkja, eftir at teir høvdu fingið upphøggingarstuðul fyri skipið.

Men fyri at bjarga hesum seinasta minninum frá gomlu slupp-og skonnarttíðini í Fuglafirði, fekk Óla Hendrik av Fløtum, sum er fuglfirðingur, búsitandi í Havn, saman við øðrum fuglfirðingum, búsitandi uttanfyri heimbygdina, stovnað sjálvsognarstovnin Karvatoftir, sum keypti Kyrjastein, har hann lá við bryggju í Vági.

Endamálið hjá sjálvsognarstovninum, sum er stovnaður í 1993, er at fáa Kyrjastein at síggja út, soleiðis sum hann upprunaliga sá út og at hava skipið standandi á landi í Fuglafirði.

Skipið skal ætlandi gerast til eitt sjósavn og seinni handast sum gáva til heimbygdina og soleiðis Fuglafjarðar kommunu.